

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 01 - 2013

# Skansi Offshore sáttmála við Statoil í Eysturafrika

Føroyska frálandareiðaríið Skansi Offshore hevur gjørt sáttmála við norska oljufelagið Statoil um, at eitt av tess skipum, Eldborg, skal arbeiða á nýggju gassleiðunum út fyri Mozambique og Tanzania. Avtalan er fyri 10 mánaðir og við møguleika at longja hana við enn 10 mánaðum. Skipið fer longu avstað í februar og skal vera veitingarskip hjá boriskipi, sum arbeiðir á eini spildurnýggjari gassleið, ið Statoil hevur funnið saman við amerikanska ExxonMobil. Hetta eru fyrstu fundini hjá teimum báðum stóru oljufeløgunum í Eysturafrika higartil og verða hesi mett at vera byrjanin til eina nýggjan gasslandslut, ið kann faa stóran týdning fyri ikki minst Statoil, sum er fyristøðufelag. Ein álitisváttan Hetta er sera gott fyri okkum, og merkir tað, at Statoil er nøgt við tað arbeiði vit hava gjørt fyri felagið og hevur álit á okkara fólki, sigur ein fegin Jens Meinhard Rasmussen, stjóri. Hann heldur tað hevur alstóran týdning fyri felagið at kunna vera við til slíkar stórar og spennandi uppgávur í einum heilt nýggjum heimsparti. Higartil hevur felagið bara arbeitt á norska landgrunninum. Sjóborg hevur í longri síð havt fastan sáttmála hjá Statoil og arbeitt verður nú við at tryggja felagnum sáttmálar fyri øll hini skipini eisini. Umleið 100 mans eru við teimum fýra skipunum hjá Skansi Offshore. Føroysk frálandaskip eru tó ikki heilt ókend um hesar leiðir. Reiðaríið Thor í Hósvík hevur í mong ár arbeitt í afrikonskum sjógvi og er eitt av tess kipum Thor Server í løtuni í Eysturafrika.